# Arbeiðssteðgur á almenna arbeiðsmarknaðinum



*Starvsmannafelagið segði ja, men fíggjarmálaráðið vildi ikki hoyra talan um ein sáttmála, sum bara var galdandi í eitt ár*

**Starvsmannafelagið góðtók eitt reallønarfall, men treytin var, at sáttmálin bert er eitt ár til longdar. Tað vildi fíggjarmálaráðið ikki góðtaka, og so er talan um arbeiðssteðg**

SAMRÁÐINGAR
*Jákup Mørk*

- Hetta er eitt úrslit, sum vit ikki eru nøgd við í tí stóra og heila.

Soleiðis byrjaði Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, tá vit fingu orðið á hann í løtunum eftir, at Starvsmannafelagið hevði havt fund um semingsuppskotið. Eitt semingsuppskot, ið bert innihelt eitt prosent í lønarvøkstri, og sum tí er minni enn inflatiónin hevur verið seinasta árið. Altso er talan um eitt reallønarfall.

- Hinvegin, so er hetta eitt framstig í mun til útspælið frá Fíggjarmálastýrinum, sum jú ikki vildi geva nakað sum helst. Tí halda vit, at hetta í verandi støðu er tað besta, sum vit kundu uppnáa. Ikki minst, tí talan bara er um ein eittára sáttmála, staðfesti hann.

Umframt lítla lønarvøksturin, so inniheldur semjan eisini nakrar broytingar í lønarflokkingunum hjá Starvsmannafelagnum.

- Tað eru størv í Starvsmannafelagnum, sum koyra við nøkrum viðbótum, sum ikki rættiliga passa inn í sáttmálan. Nú hava vit so fingið skjalfest, at hetta framyvir eisini skal koma við í lønarflokkarnar. Tað er so ikki nakað, sum vit gera eftir einum degi, men bara tað at hava fingið hetta við í sáttmálan er eitt stórt framstig í so máta.

Hartil er eisini fingið meira nágreiniliga í sáttmálan, hvussu førleikamenning skal skiljast. Hetta hevur verið nakað flótandi áður, men nú verður alt fyri eitt farið undir at greina hetta.

**Varð ikki góðtikið**

Um hálvgum tvey tíðina komu boðini um, at Fíggjarmálaráðið ikki vildi góðtaka fyriliggjandi semingsuppskotið.

Við Útvarpið segði Bárður Nielsen, at fremsta orsøkin til hetta var, at tey ikki vildu gera ein sáttmála, sum bert gekk yvir eitt ár. Hetta vildi ikki givið neyðuga friðin á arbeiðsmarknaðinum.

Hartil helt Bárður Nielsen, at vøksturin á eitt prosent eisini var í hægra lagi í mun til nulloysnina, sum fíggjarmálastýrið kundi góðtaka.

# Jan Walle leggur frá sær

**Stjórin í P/F Smyril Line, Jan Walle, fer úr starvi sínum á nýggjárinum, tá hann tekur við nýggjum avbjóðingum innan sjóvinnu í Noreg. Fyri 1. november verður greitt, hvussu framtíðar leiðsluviðurskiftini í P/F Smyril Line verða**

STJÓRASTARV
*tíðindaskriv*

Á nýggjárinum leggur stjórin í P/F Smyril Line, Jan Walle, stjórastarvið frá sær og tekur við nýggjum avbjóðingum innan sjóvinnu í Noreg.

- Eg havi fingið tilboð um starv, ið er so mikið freistandi, at eg fái ikki sagt nei, sigur Jan Walle, ið hevur verið stjóri í P/F Smyril Line síðani 1. apríl í ár.

Starvssáttmálin hjá Jan Walle gongur ikki út fyrr enn 1. apríl næsta ár, og møguleikin at leingja sáttmálan er eisini til staðar. Kortini velur stjórin at enda tænastuna í felagnum á nýggjárinum.

- Hóast møguleiki er at leingja sáttmálan, hevði eg neyvan hildið fram í starvinum eftir 1. apríl. Atlitini at familju míni, sum býr í Noreg, mugu koma framum. Eisini av teirri orsøk velji eg at taka við nýggjum starvi í Noreg", sigur 50 ára gamli Jan Walle, sum fyrst í januar fer í starv sum shippingstjóri í norska felagnum O.T. Tønnevold.

Hóast Jan Walle gevst í verandi starvinum á nýggjárinum, verður hann tøkur frameftir sum ráðgevi hjá P/F Smyril Line.

Tá Jan Walle byrjaði í starvi hjá P/F Smyril Line, var setningur hansara m.a. at økja ferðafólkatalið umborð á Norrönu. Hesin parturin av høvuðsuppgávuni er um at verða loystur, tí longu nú eru ábendingar um, at fleiri fólk hava hug at ferðast við felagnum.

- Tað er harmiligt at Jan Walle ikki kann halda fram, men vit virða sjálvandi ynski hansara um at gevast um ársskiftið. Fyri 1. november verður greitt, hvussu framtíðar leiðsluviðurskiftini í Smyril Line verða", sigur Thomas Magnussen, nevndarformaður í P/F Smyril Line.


BYGGIBÚÐ
damor


plátan 98,-
Gipsonite
13 mm Gipsonite frá danogips
Góðkend sum 1. flokks klædningsplàta
120x240 cm


Porebeton (gasbeton)
Ideelt til at gera t.d lættveggir, reolir og baðirúmsmøblar.
Stødd: 40 x 60 cm
Tríggjar ymiskar tjúktir.
5 cm 48,-
7,5 cm 52,-
10 cm 60,-


485,-
Herkules Akku bori-/skrúvumaskina
18v
1,3 Ah
2 battaríir
Tímaladara
Verður leverað í kufferti við borum og bitsum.


363,-
Nordlux Race HS
Bustað stál
Gu10 fatning
Max 50 watt perur
Avbrótari á lampuni
Við perum


217,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor